**ARKITEKTAFELAG FØROYA**
**Postsmoga 1293 • FO-110 Tórshavn • FAROE ISLANDS • ark@ark.fo**

Tórshavn 2. oktober 2015

---

# Projektkapping um nýggja kirkju á Argjum

## Yvirlit yvir uppískoyti til kappingina

### Útsetan av innlatingarfreist

Innlatingarfreistin er broytt til 2. november 2015.

### Broyting av dómsnevnd og ráðgevararum

Bergur Debes Joensen, sóknarprestur, verður ein av dómarunum í kappingini.

Samstundis fer Valbjørn Dalsgarð úr dómsnevndini, og verður í staðin ráðgevari hjá dómsnevndini.

### Fíggjarligir karmar

Dentur verður lagdur á, at fíggjarligi karmurin fer at hava týdning í dømingini og verður settur til í mesta lagi 40 milliónir krónur.

Vart verður gjørt við, at fíggjarligu viðurskiftini eru partur av metingargrundarlagnum hjá dómsnevndini.

Gjørligt skal vera at byggja kirkjuna innan ein fíggjarligan karm ásettan av kirkjumyndugleikunum. Hesin karmur er 40 mió kr. fyri bygging og lendisarbeiði og íroknað útreiðslur til projektering og byggieftirlit og aðrar veitingar frá ráðgevara.

Kravt verður ikki, at kostnaðarmeting verður latin inn saman við uppskotunum. Men um valdar eru loysnir í eitt nú innrættan ella konstruktiónir, sum kunnu vera ringar at meta um, er tað ábyrgdin hjá uppskotssetaranum at hava gjørt sannlíkt, at uppskotið kann halda seg innanfyri fíggjarliga karmin.

Dómsnevndin kann í meting sínum av uppskotum nýta uttanhýsis ráðgevarar í sambandi við fíggjarviðurskifti.

Ein endalig avtala um projektering av nýggju kirkjuni vil eisini vera tengd at byggikostnaðinum, sambært vanligum treytum fyri ráðgevaraavtalum.

## Spurningar og svar

Almennar viðmerkingar:

Spurningar kunnu vera samanskrivaðir ella umskrivaðir í mun til upprunaligu settu spurningarnar.

Summar spurningar vera ikki endurgivnir ella svaraðir. Hetta tí teir til dømis ikki hava týdning fyri kappingargrundarlagið, svarini eru sjálvsøgd, svarini kunnu finnast við at lesa kappingarskránna, ella tí at tað er uppgávan hjá kappingarluttakaranum at koma við loysnum.

### Spurningur 1

Innlatingarfreist

#### Svar 1

Freistin at lata uppskot inn er 2. november 2015. Sí uppískoyti til kappingina.

### Spurningur 2

Tilfar sum skal avleverast: Skal málið á áskriftum og frágreiðingum vera á føroyskum?

#### Svar 2

Ja.

### Spurningur 3

Tilfar sum skal avlevast: Kann latast inn eitt nú Powerpoint framløgur? Tal av heftum sum skulu latast inn?

#### Svar 3

Tikið verður ikki ímóti eitt nú Powerpoint framløgum. Talið av heftum, sum skulu latast inn er 1. Sí annars kappingarskránna, punkt 6.6.

### Spurningur 4

Luttøkurættur: Er kappingin bert fyri arkitektar, ella fyri allar føroyingar?

#### Svar 4

Kappingin er fyri allar føroyingar. Sí kappingarskránna, punkt 1. Innbjóðing.

**Spurningur 5**

Luttøkurættur: Kann ein útlendingur luttaka við einum føroyingi sum partnara?

**Svar 5**

Nei. Sí kappingarskránna, punkt 6.2 Rætturin at luttaka, og punkt 6.9 Innlatan av uppskotum. Sí eisini svar til spurning 6.

**Spurningur 6**

Luttøkurættur: Kann ein føroyingur, sum uppskotsstillari, samstarva við eina útlendska teknistovu um uppskotið?

**Svar 6**

Føroyski luttakarin skal standa sum uppskotssetari. Ein møgulig útlendsk teknistova kann vera nevnd saman við nøvnum hjá medarbeiðarunum eitt nú sum ráðgevar. Sí punkt 6.2 og 6.9 í kappingarskránni.

**Spurningur 7**

Luttøkurættur: Kann eitt samstarv við eina útlendska teknistovu halda fram eftir kappingina?

**Svar 7**

Avtalur kunnu ikki gerast við útlendskar teknistovur, sum binda byggiharran eftir kappingina.

Byggiharrin forheldur seg einans til uppskotssetarin, sum hevur upphavsrættin.

**Spurningur 8**

Hevur byggikostnaður týdning?

**Svar 8**

Byggikostnaðurin hevur týdning. Sí uppískoyti til kappingina.

**Spurningur 9**

Spurningar um parkeringsviðurskifti, punkt 2.3: Skipan og staðseting.

**Svar 9**

Innkoyring skal vera til parkeringsøkið. Sostatt kann ikki parkerast soleiðis, at koyrt verður beint út á almennan veg.

Parkeringin skal liggja á ognini hjá kirkjuráðnum.

Til ber at koma við øðrvísi parkeringsloysn, eitt nú um hetta kann geva fyrimunir fyri samlaða økið.

Treytin er tó, at uppskotssetarin eisini hevur víst, hvussu parkeringsviðurskiftinini kunnu skipast inni á økinum hjá kirkjuráðnum.

**Spurningur 10**

Staðseting av kirkjuni.

**Svar 10**

Kirkjan skal liggja á ognini hjá kirkjuráðnum. Legg eisini til merkis fylgiskjalið "Serstøk byggisamtykt" á síðu 30 og fylgjandi í kappingarskránni.

**Spurningur 11**

Skulu detaljur teknast, eitt nú knútapunkt í konstruktiónini?

**Svar 11**

Talan er ikki um at gera forprojekt, høvuðsprojekt ella detailprojekt.

Í tann mun eitt nú konstruktivu valini hava týdning fyri upplivisið av kirkjuni, eiga hesi í neyðan mun at lýsast visuelt.

**Spurningur 12**

Ber til at leiða vatn úr Sandá inn á økið við kirkjuna?

**Svar 12**

Sandá er friðað sambært náttúrufriðingarlógina.

Roknast kann tí ikki við at loyvi fæst til inntriv, ið gera seg inn á ánna ella áarbakkarnar.

Um ein í einum kappingaruppskoti arbeiðir við vatni í økinum kring kirkjuna, má hetta ikki hava sum fyritreyt, at inntriv vera framd, sum krevja loyvi frá friðingarmyndugleikanum.

Tá farið verður undir endaliga projektering aftaná kappingina er møguleiki at taka ein slíkan spurning upp við friðingarmyndugleikan.

**Spurningur 13**

Punkt 3.10 Kirkjurúm, 2. reglubrot: Hvat merkir"at stilla upp í prosessión" og hvussu nógv pláss krevur tað?

**Svar 13**

Tað er uppgávan hjá uppskotssetaranum at seta seg inn í kirkjulig viðurskifti. Her kann stutt nevnast, at prosessión í kirkjuni umfatar at bera barn til dóp, at føra brúður til altars og úr kirkju, at bera kistu úr kirkju, at føra konfirmantar í kirkju, og ávísar aðrar kirkjuligar handlingar.

## Spurningur 14

Køkur: Bert ein (stór)køkur er nevndur í hølisskránni, punkt 4.11 og 5.2.11. Í onkrum rúmum t.d. rúm til barnaansing, punkt 4.13 og 5.2.13, letur til at vask ella tékøkur krevst eftirsum at "møguleiki skal vera fyri kreativum virksemi". Kann tað væntast at koma sum ynski ella krav?

**Svar 14**

Tað krevst vask í ella tætt við rúmið til barnaansing (4.13 og 5.2.13).

Tað er upp til uppskotsetarin at gera uppskot um høgliga innrætting annars, herundir at møguleiki skal vera fyri at kunna gera eitt nú ein drekkamun uttan at skula flyta seg óneyðuga langt.

## Spurningur 15

Um listaverk eru týðandi fyri eitt uppskot, og trupul hjá dómsnevndini at meta um kostnaðin av, ber tá til at nevna prís og listafólk í uppskotinum, samstundis sum avtala við listafólkini kemur við í uppskotið?

**Svar 15**

Uppskotssetarin skal gera sannlíkt, at uppskotið heldur seg innanfyri ásetta fíggjarliga karmin. Hetta kann tildømis gerast við eini kostnaðarmetan av listarliga partinum.

Leggjast skal til merkis, at um listarverkið er avgerandi fyri uppskotið, og talan er um listarfólk, sum ikki lúka treytirnar fyri luttøku, eitt nú tí talan er um útlendingar, lýkur uppskotið ikki treytirnar fyri luttøku.

Hervið er ikki sagt, at útlendsk listarverk ikki seinni kunnu gerast partur av kirkjuni.

Vart skal eisini gerast við, at talan er um almenna kapping, har eisini listarfólk kunnu vera uppskotssetarar.

## Spurningur 16

Um listafólk ikki ynskja at upplýsa prís fyri almenninginum, kann prísurin so vera fjaldur til sýningina?

**Svar 16**

Ætlanin er ikki at detaljerað kostnaðarætlan verður partur av framsýningini.

**Spurningur 17**

Er møguligt at fáa meira at vita um 80 fermetra stóra ikki innrættaða rúmið, punkt 4.20 og 5.2.20?

**Svar 17**

Talan er um eitt rátt rúm uttan innstallatiónir. Møguleiki skal vera fyri seinni innrætting, við hartil hoyrandi atkomu, eisini fyri fólki við breki.

**Spurningur 18**

Bíðirúm til brúdleyp og barnadóp, punkt 3.9 og 5.1.9, hvussu nógv pláss skulu tey rúma?

**Svar 18**

Støddin er lýst í punkt 5.19. Tað er upp til uppskotssetarin at koma við uppskoti um innrætting. Møguleika skal tó vera fyri at kunna seta seg niður, møguliga á leysum stólum.

**Spurningur 19**

Kann gólvið í kirkjuskipinum, punkt 3.10 og 5.1.10, hava ein lítlan (mildan) skráa?

**Svar 19**

Tað er upp til uppskotssetaran at gera eina nýtuliga loysn.

Tað er dómsnevndin, sum tekur støðu til uppskotnu loysnirnar.

**Spurningur 20**

Er tað avgerandi, at kór og urga standa í somu síðu av kirkjuni, punkt 3.11?

**Svar 20**

Tað er upp til uppskotssetaran at gera eina nýtuliga loysn.

Tað er dómsnevndin, sum tekur støðu til uppskotnu loysnirnar.

**Spurningur 21**

Kann sakristiið (skrúðrúmið), punkt 3.14 og 5.1.14, bindast saman við forkirkjuna, ella skal tað knýtast til kórið?

**Svar 21**

Tað er uppskotssetarin, sum skal seta seg inn í viðurskifti í sambandi við kirkjubygningar. Her skal stutt nevnast, at sakristi eru knýtt til kórið.

**Spurningur 22**

Í sambandi við, at kapellið, punkt 3.16 og 5.1.16, skal kunna kølast, snýr tað seg tá um serligt slag av útgerði, og um so, hvat slag?

**Svar 22**

Uppskot skal ikki gerast um ávíst slag av útgerði.

**Spurningur 23**

Í tekstinum stendur minst 6 stólar í kapellinum, punkt 3.16 og 5.1.16, er talan um t.d. 6-12 stólar?

**Svar 23**

Minst merkir minst.

**Spurningur 24**

Skal kapellið, punkt 3.16 og 5.1.16, vera ein nisja í kirkjuni, ella skal tað vera eitt rúm fyri seg?

**Svar 24**

Kapellið skal vera eitt rúm fyri seg.

**Spurningur 25**

Skulu tað vera klokkur í kirkjutorninum, punkt 3.17 og 5.1.17, og um so er, skal tað vera manuelt?

**Svar 25**

Tað er upp til uppskotssetaran at koma við uppskoti til loysn.

Kirkjan skal í øllum førum hava klokkur.

Undir øllum umstøðum skal møguleiki vera fyri at installera automatiskt klokkuspæl.

Tað er dómsnevndin, sum tekur støðu til uppskotnu loysnirnar.

**Spurningur 26**

Spurningar um kombinering av rúmum og møguleikar fyri samanlegging.

**Svar 26**

Tað er upp til uppskotssetaran at koma við uppskoti til loysn.